# HEILSANIR



**Góða Jakoba**
Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum í dag. Harrans signing í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**



Vit vilja hjartaliga takka øllum, sum á ein og annan hátt vóru við at gera hjúnabandsdag okkara 4. juli 2009 so hugnaligan og ógloymandi. Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár ynskja vit tykkum.
**Kærar heilsanir Elfrida & Jóanes Johannesen**



Við hesi heilsan, vilja vit takka familju, vinum og øllum tykkum, sum gjørdu hjúnabandsdag okkara 10. sept. 2009, so sera hugnaligan og ógloymandi. Ein tøkk til Jógvan Fríðrikson fyri sera dámliga vígslu. Ein tøkk til tykkum, sum spældu í kirkjuni, uppá klarnett við Peder Riis-Jensen. Hvørt ting setti sín dám á alt og gjørdi dagin ógloymandi og droymandi. Ein tøkk til tykkum á Hotel Hafnia, og ein serlig heilsan til Smyril Line, skipara og manning á M/F Norrønu, fyri at hava gjørt ein part av okkara brúðarferð ógloymandi. Vit vilja ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Katy og Hannis**



**Góða fitta Barbara**
Hjartaliga tillukku á tínum 5 ára føðingardegi 20. des. Hopi tú fært ein stuttligan dag. Jesus pápi veri hjá tær. Muss og klemm.
**Abbi og omma**



**Góði fitti Dan Eyðun**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 18. des. Vit elska teg.
**Kærar heilsanir Katarina, Karsten, mamma og babba**



**Góða mamma og pappa**
Hjartaliga tillukku við 55 ára brúdleypsdegnum. Alt gott í framtíðini.
**Heilsan Jónfríð**



Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum gjørdu hjúnabandsdag okkara 18. juli 2009 so sera hugnaligan og ógloymandi. Takk fyri blómur, gávur og heilsanir.
**Heilsan Rósa & Harry**



**Gullbrúðarparið Helena og Trygvi Guttesen**
Góðu foreldur, verforeldur, omma og abbi. Hjartaliga tillukku á gullbrúdleypsdegnum tann 19. desember 2009. Vit gleða okkum at hátíðarhalda dagin saman við tykkum og ynskja tykkum alt tað besta í árunum sum koma.
**Kærar heilsanir Olav, Yngvi og Hans Einar við familju**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið gleddu okkum á silvurbrúðleypinum, sum vit hildu tann 26. sept. 2009 og gjørdu dagin so hugnaligan og ógloymandi.
Takk fyri gávur, blómur og heilsanir. Takk til familju, vinir og arbeiðsfelagar fyri góða hjálp. Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Bestu heilsanir Súsanna & Tórolvur Joensen, Leirvík**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 08.08.09 ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur og heilsanir. Eisini ynskja vit at takka tykkum, ið veittu eina hjálpandi hond og til tykkum, ið gleddust saman við okkum. Tykkum øllum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Malan & Páll**



Eg og foreldur míni takka øllum, ið gleddu meg á fermingardegi míni 4. okt. 2009. Eisini ynskja vit øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár.
**Heilsan Helena Djurhuus**



Eg takki hjartaliga tykkum mongu, sum á ymsan hátt gleddu meg á fermingardegnum 5. apríl 2009. Foreldur míni og eg ynskja ætt, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt vælsignað nýttár.
**Karina Spange Davidsen, Hósvík**



Vit vilja takka øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara tann 4. juli 2009 so fantastiskan og ógloymandi. Stóra tøkk fyri gávur, heilsanir og alla hjálp vit fingu. Og ikki minst takka vit øllum tykkum, sum gleddust saman við okkum á tí stóra degnum. Eisini vilja vit ynskja tykkum øllum eini gledilig jól og eitt av Harranum vælsignað níggjár.
**Paulina Maria og Heri Norðberg**



Vit vilja takka øllum tykkum, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 25. apríl 2009. Hjartaliga takk fyri tíð, kærleika, gávur, fjarrit, talir, sangir og hjálp á degnum. Vit ynskja tykkum eini gleðilig jól, og eitt av Harranum signað nýttár.
**Elsebeth & Marni Steinberg**